tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 93 hósdagur 18. mai 1995 69. árgangur Krónur 7,00

### *Kaj Mortensen, fiskivinnustovan:*

# Fiskiveiðu-eftirlitið er ikki nóg gott

***– Størsti vansin er, at eftirlitið er býtt sundur millum triggjar stovnar løn-javningargrunnin, vaktartænastuna og fiskivinnustovuna. Hetta er ein ógvuliga tung og dýr skipan. Sjálvsagt átti eftirlitið at verið ein sjálvstøðugur stovnur, eins og lógin ásetir. Hetta hevði verið effektivari og munandi billigari, sigur Kaj Mortensen***

*síða 8*

# Danskur embætismaður forstjóri í Tinganesi

*síða 4*

*BJARTI MOHR, Fiskavirking:*

# Fleiri virki verða ikki latin uppaftur

*síða 6 & 7*

### *Tað er oljan, sum telur:*

# Vónandi finna vit ikki gass

*Hetta var ein av niðurstøðunum, føroyskir tíðindamenn komu til, tá vitjað varð á oljupallinum Nelson í Norðsjónum* ***síða 10, 11, 12 & 13***





*Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, Jógvan Arge, varastjóri í útvarpinum og Dia Midjord, bladmaður á Dimmalætting her í fullari "mondasju" júst lendir á oljupallinum Nelson í Norðsjónum. Mynd jan*

*Bladstjórin á Tíðindabladnum Sosialinum umborð á Sikorsky tyrluni við kós móti Nelson oljupallinum í Norðsjónum. Mynd Dia Midjord.*



*Umborð á oljupallinum Nelson í Norðsjónum:*

# Møgulig oljuvinna við Føroyar útilokar stóru oljupallarnar

Leiðin gongur eystur í havteit umleið 200 kilometrarnar úr Aberdeen til stóra oljuøkið Forties, ið liggur skamt frá norska markinum. Kósin er sett móti einum av smærri grannunum hjá stóra Forties feltinum, nevniliga so gott sum spildurnýggja gullegginum í oljuvinnuni í Norðsjónum, Nelson.

Tað er ikki av tilvild, at hetta heldur nýggja oljufelagið Enterprise Oil hevur valt at kalla henda sín fyrsta oljupall upp eftir kenda bretska admiralinum Nelson.

Eins og tað bert fanst ein Nelson í forðum, so finst tað bert ein oljupallur, sum tolir at verða uppkallaður eftir hesum fyrri bretum navnframa persóni.

Nelson oljupallurin er nevniliga ikki eitt kopi av øðrum pallum í Norðsjónum. Hann er nakað fyri seg, nakað, sum tey stóru feløgini í oljubransjuni øvunda Enterprise Oil.

Vit hava verið á flogi í góðan tíma, tá vit síggja gasslogan upp úr torninum á syðru síðu á Nelson pallinum.

Væl bjálvaður og tryggjaður í yvirlivilsisbúnað stevnir tú nú beint niður móti tí so eyðkenda tyrludekkinum, sum finst á øllum oljupallum og sum er brúgvin til umverðina. Tann stóri russiski Sikorsky helikoptarin lendir í øllum góðum, og fýra føroyskir journalistar og fimm oljuarbeiðsmenn stíga niður á dekkið. Fyri hesar ungu menn í offshore-vinnuni er hetta bara vanliga rutina. Teir hava júst verið í landi í tvær vikur, og skulu nú aftur vera til arbeiðis á pallinum í tvær vikur.

**Ein heilt nýggj verð**

Fyri okkum journalistar er hetta øðrvísi. Hetta er heilt nýggj verð fyri okkum. Tað er fyrstu ferð vit vitja ein oljupall og hugsa vit, at hetta helst eisini er seinastu ferð. Verður olja funnin við Føroyar, so verða tað ikki oljupallar av hesum slag, sum fara at stinga seg upp sum hundaland úti á landgrunninum. Tá verða tað helst flótandi framleiðsluskip, ið fara at gera arbeiðið, sum í dag verður gjørt á teimum mongu oljupallunum eitt nú í Norðsjónum.

Eitt lítið lot er av norði men einki sum bilar. Larmurin frá tyrluvongjunum er øgiligur. Vit verða alt fyri eitt førdir til bústaðirnar, sum liggja á norðaru síðu av pallinum, so langt burtur frá framleiðsluøkinum sum gjørligt. Tú varnast alt fyri eitt, at ein oljupallur sum hesin er einki minni enn ein lítil býur, har alt er gjøgnumhugsað og lagt soleiðis tilrættis, at trygdin altíð - altíð - er í hásæti.

Komnir innar fara vit úr ti heldur tunga búnanum og skifta í onnur meira løtt arbeiðsklæði, tjúkkar gummistyvlar, hjálm og verjubrillur. Hetta lá alt klárt til hvønn einstaka. Vit høvdu sagt frá støddframmanundan.

Vit fingu heimanvegin greið boð um ikki at brúka myndatólið úti á sjálvum arbeiðsdekkinum. Blitz máttu vit so slettis ikki brúka. Er bert lítil ferðil av gassi í luftini, so kann blitzið seta eld í tað heila.

Høvi var síðani at síggja allan oljupallin og tosa við arbeiðsfólkið.

**Tann mest framkomni pallurin**

Tú merkti alt fyri eitt, at manningin, ið bert telur 110, hetta er munandi minni enn á teimum »gomlu« oljupallunum, ið hava upp til 400 mans umborð, er sera errin av sínum arbeiðsplássi. Sum navnið her boð um er Nelson oljupallurin ikki nakar heilt vanligur oljupallur.

Hetta skal skiljast soleiðis, at hann telist millum teir mest framkomnu í heiminum í dag. Og hesum kann ein takka teimum heldur ungu, vælútbúnu og royndu verkfrøðingunum og »offshore« fólkunum hjá Enterprise fyri.

Hesi hava nevniliga lagt seg eftir at byggja ein oljupall, sum er nógv framkomnari enn aðrir og sum harvið eisini gevur nógv størri yvirskot.

Alt er gjørt so rationelt sum hugsast kann og sjálvur »kommando/kontrol sentralurin« er ikki stórt størri enn ein føroysk stova. Har er so eisini bert ein maður, sum ansar eftir teimum lýsandi teldunum.

Higani verður øll framleiðslan stýrd. Umleið 160.000 tunnur av olju verða hvønn dag stýrdar úr undirgrundini um teldurnar í ein rørleiðing, sum so flytur oljuna víðari inn á skotska meginlandið. Tað løgna er - í hvussu er fyri ein fremmandan - at tú fært ikki eygað á ein tann einasta oljudropa undir allari vitjanini umborð. Men nakað av gassi fer so upp í loft. Men meginparturin av gassinum fer víðari gjøgnum oljuleiðingar inn á meginlandið.

Tá vit seinni vitjaðu á høvuðsstøðini hjá Enterprise á Trafalgar Square í London duldu oddamenninir har heldur ikki fyri, at teir vóru sera stoltir av og fegnir um fyrsta oljupall felagsins, Nelson.

⇨

### Sprænir pengar upp úr undirgrundini

Hann sprænir nevniliga pengar upp úr undirgrundini – so mikið nøgvar, at Enterprise í dag er eitt felag í størri framgongd og verður í dag nøgv virt millum stóru oljufeløgini. Tað er eitt tað størsta sjálvstøðuga oljufelagið í Bretlandi í dag.

Ikki so løgið heldur. Tí meðan flestu av grannapallunum í Norðsjónum framleiða eina tunnu av olju fyri millum 3 og 4 dollarar, so klára teir hetta á Nelson fyri millum 1 og 2 dollarar. Við eini framleiðslu upp á 160.000 tunnur um dagin verður talan um stórar peningainntøkur.

Kemur tú úr Føroyum og ikki er vanur við tey heilt stóru tølini, so verður tú nærum svimbul, tá tú so spakuliga roynir at leggja saman og falda tølini við dollarakursinum.

Nelson framleiðir fyri góðar 20 mill. kr. um dagin. So kunnu vit sjálvi rokna út, hvussu ørandi stórar upphæddir talan verður um eftir bara einum ári.

Og taka vit so hesa einu keldunа, sum Nelson pallurin stendur omaná, so er hon mett at goyma einar 450 mill. tunnur av olju. Hetta er umleið sama nøgd, sum hvør av teimum báðum oljukeldunum hjá BP við føroyska markið, Foinaven og Schiehallion, eru mettar at goyma.

Gera vit so eitt lítið tanka-eksperiment og flyta okkum inn á føroyska landgrunnin, so skilja vit bráddliga, hvussu nøgvir pengar kunnu vera í oljuni, nú bert ein oljukelda sum Nelson leggur 20 mill. kr. eftir seg um dagin.

### Stórar íløgur

Men ein kemur ikki sovandi ella ókeypis til eina slíka inntøku. Enterprise hevur brúkt sera stórar upphæddir til at byggja Nelson og menna hetta oljuøkið, ið fyritøkan stendur sum operatørur fyri. Talan er um góða mia. kr.

Steðgurin umborð er bert tríggjar tímar. Men hesa tíðina hevur tú so eisini hevt at fáa innlit í ein heilt nýggjan og fremmandan heim.

Fólkini, sum arbeiða umborð, dáma væl, og tey eru eisini væl lønt. Tað halda tey so eisini vera rímuligt, tí tey eru burtur heimanífrá í fjúrtan dagar, har tey ofta arbeiða upp í 15 tímar um samdøgrið. Harafturat er talan um eitt sera vandamikið arbeiði. At arbeiða við olju og gassi vil altíð verða mett vandamikið, hvussu trygt arbeiðsplássið enn er. Tí eru lønirnar eisini hægri.

Men tað er so ikki bert tíð til at arbeiða, eta og sova umborð. Har er eisini gjørt nøgv fyri manningina, so leiðis at hon skal hava okkurt ítriv í frítíðunum. Sum nakað heilt nýtt hava teir umborð á Nelson útvegað sær tvey stór billardborð. Hetta var so fyrstu og helst einastu ferð, at undirritaði fekk høvi at ríva í køna umborð á einum oljupalli.

Eftir at hava fingið ein góðan bita og mjólk – allur rúsandi løgur er bannaður umborð eins væl og roykjing – varð aftur farið í tjúkka yvirlivilsisbúnan og í tyrluna.

### Nøgv øðrvísi við Føroyar

Á veg aftur til Aberdeen í Sikorsky tyrluni roynir tú at gera tær eina mynd av, hvussu fer at síggja út á føroyska landgrunninum um nøkur ár, um olja verður funnin har.

Greitt er, at tað verður so ikki nær námind tí, við í dag síggja í Norðsjónum. Her finnast heilir býir úti í havinum, har tað búleikast túsundtals oljufólk.

Við Føroyar og fyri tað eisini vestan fyri Hetland, har teir í løtuni eru við at rigga til at fara undir fyrstu framleiðsluna, eru viðurskiftini nøgv øðrvísi. Her er nøgv djúpri, streymurin er harðari, aldurnar størri, og tað finst í dag heldur eingin infrastrukturur í økinum.

Í Norðsjónum er hetta so nøgv øðrvísi. Nelsonpallurin stendur á 84 metra dýpi. Skuldi hann staðið á føroyska landgrunninum vildi talan verið um upp til 1000 metra dýpi. Tær íløgurnar kann ein olju vinna í slíkum farvatni als ikki bera.

Tí venur tú teg alt fyri eitt til tankan, at tað verður ikki hetta slagið av arbeiðsplássum, sum vit fara at síggja á havleiðunum millum Føroyar og Hetland um nøkur ár.

Tað verða ístaðin stór flótandi framleiðsluskip, sum koma at liggja á sama stað alt árið. Tey fara bæði at kunna framleiða og goyma olju, sum síðani verður flutt víðari við tangaskipum. Her í Norðsjónum er infrastrukturin so mikið væl útbygdur, at øll oljan og alt gassið fer inn á meginlandið gjøgnum leiðingar á havbotninum.

Slíkar leiðingar fara vit neyvan heldur at síggja við Føroyar í fyrstu atløgu. Tað verður ov dýrt at leggja teir á stóru dýpunum.

Samanumtikið gerst tú eftir vitjan umborð á einum

⇨



*Her er hann – millum oljufólk nevndur gull-eggið – oljupallurin Nelson í Norðsjónum. Hann framleiðir olju og gass fyri 20 mill. kr. um dagin. Felagið Enterprise, sum eigur hann, hevur stóran áhuga fyri føroyska økinum. Mynd jan*




*Nelson oljupallurin er 200 kilometrar eystan fyri Aberdeen og er granni hjá tí risastóra Forties-feltinum.*



*Inni í kontrolrúminum á Nelson. Dia Midjord og Jógvan Arge saman við "skiparanum". Mynd jan*



*Leiðin gongur "heimaftur" til Aberdeen av Nelson oljupallinum. Sjónvarpsmaðurin og útvarpsmaðurin seta út í kortið. Mynd jan*

oljupalli í Norðsjónum greiður yvir, at ein møgulig føroysk oljuvinna fer at verða heilt øðrvísi.

Tó so, at flestu tænastur verða tær somu. Eitt nú er neyðugt við støðugari tyrluflúgving millum land og pall/skip. Neyðugt er við supplyskipum at liggja á tínum og neyðugt er við goymslum, havnaanleggum o.l. á landi til at tæna oljuvinnuni.



*Pílurin vísir, hvar Nelson oljupallurin er*

**Ein "vanlukka" finna føroyingar gass**

Meðan tú situr har í tyrluni og nærkast strondini kemur tær til bráddliga til hugs orðini hjá einum av verkfrøðingunum hjá Enterprise Oil.

Hesin helt nevniliga fyri, at føroyingar máttu vóna, at tað var olja og ikki gass í føroysku undirgrundini. Sjálvandi er altíð nakað av gassi knýtt at oljukeldum, men nøgdin kann variera ómetaliga nógv. Oljufeløgini, sum arbeiða í Norðsjónum í dag høvdu verið mest fegin, um teirra keldur í nógv størri mun vóru goymdu olju heldur enn gass. Hetta kemur av, at tað krevst stór íløga at fáa gassið til høldar og flutt til marknaðin. Sum er er marknaðurin eisini avmarkaður. Tað er longu nókk av gassi á marknaðinum, og tað kann ikki løna seg at brúka stórar upphæddir at fáa gassið til høldar eisini, har tú arbeiðir við oljuni. Tað er spurningurin, hvussu væl tað loysir seg at flyta smærri nøgdir av gassi, tá tú leggur størsta dentin á oljuframleiðsluna. Er tú heppin at kunna knýta í eina verandi oljuleiðing, so kann hetta forsvarast, men finst ongin slík í grannalagnum, so mást tú sleppa av við gassið onkursvegna. Tú sleppur ikki at brenna alt av, tí harvið dálkar tú umhvørvið. Tí eru nógv oljufeløg noydd til at brúka stórar upphæddir til tess at fáa gassið niðuraftur í undirgrundina.

Tá vit komu at práta við verkfrøðingin umborð á Nelson um møguleikarnar at finna olju við Føroyar sigur hann við eitt, at so er at vóna, at gassið her er ein viðfáningur.

-Í Føroyum er fyri tað fyrsta eingin infrastrukturur, sum kann flyta gassið víðari. Tvs. at tit verða noyddir til at fáa gassið til høldar aðrar vegir og tá kann tað blíva sera dýrt. Einasti útvegurin kann tí verða, at brúka nógvar pengar til at fáa gassið niður aftur í undirgrundina. Tí vóni eg fyri tykkum, at tit ikki finna størvegis av gassi í undirgrundini sigur hann.

Heimferðin av Nelson oljupallinum gekk sum hon skuldi.

Eftir henda túrin varð gott at sleppa at hvíla seg, tí morgunin eftir skuldu vit hitta umboð fyri stóra amerikanska oljufelagið Mobil Oil, sum eisini hevur stóran áhuga fyri føroyska økinum.

jan

Vit hava **ALT til BAÐIRÚMIÐ**
– t.d. stórt úrval av baðirúmsskápum frá **HAFA**



»Silvia«: B 90 / H 69 / D 15

RØTTU PRÍSIR & BESTA DYGD

Øll við spegilshurðum uttan/innan og í ervaljósinum, sum fæst til øll skápini, 110/220 V við jørð.

*Vitjið framsýning okkara á Hálsi ella ringið og fáið tilfar sendandi*

P/F Svend Krosstein
Falkavegur - Tlf. 14600
VHS
Alt tilfar til VATN HITAVERK SANITET

**TVINGSILSSØLA**
**Hósdagin**
**8. juni 1995,**
**kl. 13.10**

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 187, Sandavági, 360 Sandavágur, (AS 140/95).**

Ognin er eitt grundøki stórt 430 kvm smb. tingbók við ástandandi sethúsi í kjallara-, stovu- og loftshædd við tilbygningi, gjørd av betong og takt við jarni.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum, Bryggjubakki 22 v/ Jógvan E. Ellefsen, adv. (Inn. nr. 37892),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 16. mai 1995*
Henrik Engell Rhod
dfm.

**TVINGSILSSØLA**
**Hósdagin**
**tann 8. juni 1995,**
**kl. 13.00**

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla av **matr. 1015 s, Tórshavn,** ið liggur á Dr. Dahlsgøtu 7, 100 Tórshavn **(AS nr. 124/1995).**

Ognin er eitt grundøki, sambært tingbók stórt 222 kvm. við ástandandi sethúsi í kjallara-, stovu- og loftshædd, gjørd av timbri og takt við eternit.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum, Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, att. Petur Even Djurhuus, innh. nr. 40102,** og við at venda tygum til nevnda, kunnu tygum fáa nærri upplýsingar um ognina umframt avtala tíð fyri at síggja hesi.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 16. mai 1995*
Henrik Engell Rhod
dfm.

**DANNY TRANSPORT**
– tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 19192**

**Lívdin, Dj. í Geilsgøtu 1**
**Opið er sóleiðis: Mikukvøld frá kl. 20–23, fríggjakvøld og leygarkvøld frá kl. 19.00 til 01.00, og sunnukvøld frá kl. 19.00 til 23.00.**
**Aldursmarkið er 16 ár.**